FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 24. august 2021
J. nr.: 21/15892
Viðgjørt: AE

Svar til fyrispurning nr. 52-020/2021 frá Bjarna Hammer, løgtingsmanni, settur Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um eyka skip til Suðuroynna

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Ætlar landsstýrismaðurin at fáa eyka skip at stuðla Smyrli á Suðuroyarleiðini?

2. Hvussu langt er arbeiðið komið við at finna eina varandi loysn til trupulleikan við at fáa farm til og frá Suðuroynni?

Svar:
Framburður er í Suðuroy, og mongdin av farmi hevur verið alsamt vaksandi seinnu árini. Hetta millum annað vegna gongdina innan fiski- og alivinnuna í Suðuroy, og annars samfelagsmenningini sum heild. Strandferðslan ásannar, at tað er stórt trýst á Smyrli á Suðuroyarleiðini og neyðugt er at økja flutningsorkuna við farmi.

Saman við Strandferðsluni hevur landsstýrismaðurin viðgjørt málið og um hvørjir møguleikar eru. Strandferðslan og landsstýrismaðurin hava havt samrøður við privatu flutningsfeløgini, um møguleikar fyri at flutningsfeløgini kunnu átaka sær, at sigla farm til og frá Suðuroy nakrar ferðir um vikuna.

Hugskotið er væl móttikið av flutningsfeløgunum. Feløgini løgd dent á, at um kostnaðurin fyri at flyta farm ikki skal hækka, er neyðugt at játta pening til endamálið. Arbeitt verður við málinum politiskt.

Eg vóni, at tað ber til at finna eina politiska semju í sambandi, sum kann tryggja farmflutning á suðuroyarleiðini – eins og samgongan gjørdi fyri Sandoyarleiðina í 2020.

Tinganes, 24. augst 2021

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður í fíggjarmálum